



Silvaland á Summar Festivalinum:

# - Føroya størsta og besta familjuland



**Festivalar og ævintýr líkjast eitt sindur. Í øllum førum í Silvalandinum, har børn sleppa at hugna sær og hava tað stuttligt, meðan foreldrini taka sær av løttum eina løtu**

FESTIVALLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

Størsta familjulandið í Føroyum bjóðar tær í 2009 vælkomnan á økið við indianarum, einum góðgætishúsið, túnafótbólti og nógvum øðrum stuttligum tingum. Við eini størri og nógv meira fjølbroyttari skrá er ætlanin at gera Silvaland hugnaligari enn nakrantíð fyrr og er einasta endamálið við hesum at gera festivalbørnini glað.

- Vit fara at gera deiliga økið mitt í býnum um til eitt lítið ævintýrland, har bæði børn og vaksin sleppa at gloyma gerandisdagin eina løtu saman við fólki, sum øll hava goymt spæligleðina í hjartanum, fortelur Finn Johannsensen, sum er ein av samskiparunum á Silvalandinum.

Millum øll fólkini í ævintýrlandinum kanst tú millum annað hitta besta evropeiska andlitsmálaran Pailette, sum annars ferðast runt í øllum heiminum. Hon kemur at mála børnini við skapandi hugflogi og stuttligum litum, meðan tann best umtókti gyklarin í danska ríkinum, Pegani, kemur at undirhalda bæði á Silvapallinum og eisini millum fólkini.

Á Silvapallinum kanst tú eisini royna breakdance, fimleik, kappast í kareoke og ikki minst uppliva TNT; bólkurin, sum byrjaði í Húsinum og sum longu nú hevur ferðast runt landið við stuttligum framførslum.

Um hetta ikki er nóg mikið, so ber eisini til sjálvur at sleppa upp í part, tá skipað verður fyri stórari skattaveiðu, har atgongd er noktað foreldrum. Ístaðin fær hvør barnið ein seðil við navni og telefonnummar hjá foreldrunum – og so verður annars fari avstað við umleið 100 børnum. Eisini kanst tú leita tær inn í Góðgætishúsið, sum í ár verður gjørt munandi størri enn seinasta ár ella royna teg sum ein rættan gullgravara og síla rennandi sand við vónini um at finna okkurt blankt, sum kann gera teg festivalríkan.

- Sum nakað heilt nýtt fara vit eisini at hava kvøldsetir við felagssangi og øðrum fyri børn. Hetta eru vit ordiliga spent til at sleppa at royna, leggur Finn Johannesen afturat og greiðir frá, at tað ikki bara fara at henda spennandi ting á sjálvum Silvalandinum.

- Vit fara eisini at gera heilt nógv burturúr kampingplássið beint við festivaløkið. Her fara vit m.a. at hava eitt stórt uppruna tipi-tjald frá Sámalandið standandi, har fólk kunnu keypa sær mat, meðan børnini og tey ungu fáa møguleika til at rógva í smáum jollum á vágni, sigur Finn.

Á vágni verður harumframt eisini skipað fyri vatnítrótti av ymsum slag og kanst tú soleiðis samantvinna tónleikaligar upplivingar við adrenalinkick av besta slag.

- Absolutt nakað, sum øll áttu at roynt í minsta lagi eina ferð, sigur Finn Johannesen at enda.





## Túnatos

**Gunn Weihe Reinert er 27 ára gomul, lesandi og annars kend sum ein stuttligur bloggari við hvøssum penni. Hon hevur verið á Summar Festival eina ferð...**

**1. Fert tú á SF í ár?**
*Nei. Tíverri. Tað plagar altíð at vera eitt "kanskaa", men í ár verði eg støđd uttanlands.*

**2. Hvør hevur verið besta konsertin nakrantíð á SF?**
*Konsertin hjá Rodger Hodgson í 2006 liggur í toppinum. Hatta var árið við øllum mjørkanum og konsertir vóru rokeraðar aftur og framm ella avlýstar. Konsertin hjá Hodgson kom at liggja tíðliga um morgunin, tað var farið at lýsna og stemningurin var amazing. Somuleiðis var sjálv konsertin.*
*Náhja, og ikki at gloyma F. R. David, tá hann spældi Words fyri 8 ferð.*

**3. Svevur tú í tjaldi ella ordiligari song á SF?**
*Song. Í Klaksvík. Mær dámar ikki at føla blóðið renna oman í høvdið, meðan eg sovi.. Og tað ger tað eisini, viss man vendir sær hinvegin, eg svørji!..*

**4. Hevur tú nakrantíð skora á SF?**
*Uha, nei. Oddsini fyri, at tað er ein klaksvíkingur, eru alt ov stór.*

**5. Hvør hevur verið tín løgnasta uppliving á SF?**
*Festivalar eru totalt fyri Gunnir. Man gongur runt og hevur tað feitt og hoyrir feitan tónleik. Og um morgnarnar/fyrrapartarnar, tá man sær út sum sórit, kettan hostar upp – so goymir man seg bara aftanfyri einar monster sólbrillur og sumpar runt millum fólk og tónleik í tí herligu atmosferini. Tað hevur man lov til, tí tað ger man á festivalum.*
*Tað gekk eg eisini út frá var galdandi á SF. Mmm. So eg fór vassandi í allari míni sumputheit. Waaa... So líðandi kom eg til at kenna meg sum heimsins mest malplaseraða menniskja. Fólk vóru í teirra finasta sunnudagspussi, tónleikur lovprísti himmalinum og har var í hvussu so er eingin við sólbrillum.*
*Beint tá eg fór skramblandi gjøgnum eitt runudýki sá eg, hvussu einkultar sólglæmur kleimdu seg gjøgnum skýggini og lýstu hitandi á øll tey vøkru pørini, sum gingu túr við barnavognum.*
*Næstu ferð skal eg minnast til at bíða nakrar tímar, áðrenn eg fari út at sumpa...*

# Kjallarabólkur á festivalpall

**Argandi, erlig og stuttlig løg verða á skránni, tá framfýsni bólkurin Grandma's Basement koma á pallin hjá Summar Festivalinum**

Grandma's Basement er ein tónleikabólkur úr Klaksvík. Teir hava nøkur fá ár á baki, men hava langt síðani gjørt vart við seg við løgum sum "Bangna Beistið", "Minnini", "Dansurin" og ikki minst "Getze".

Hetta er popprokkur við einum serligum tvisti av humori og syngja teir við einum skálkabrosi um nakað av tí, teir uppliva í gerandisdegnum.

Sum fleiri uttan iva minnast spældi Grandma's Basement eisini á Summar Festivalinum í fjør. Tann framførslan eydnaðist so mikið væl, at fyrireikararnir nú hava sent boð eftir bólkinum um at spæla aftur í ár. Tíbetur fyri øll, sum ætla sær á Summar Festival, blunkaðu teir ikki við og søgdu ja. Eftir er so bert at gleða seg til eittsindur av dreingjarumpusligum tónum, sum vit bæði kenna frá undanfarnum framførslum og longu innspældum løgum.




*Dreingjarumpurnar í Grandma's Basement verða aftur at hoyra á Summar Festivalinum í ár*

